## DAGSINS MEINING

# Eiga sjálvir at gjalda!

Eftir øllum at døma er ósemja í landsstýrinum um ætlanina at taka yvir floghavnina frá donskum loftferðslumyndugleikum eftir tí nýggja sjálvstýrisleistinum hjá landsstýrissamgonguni. Fólkaflokkurin er, eftir tíðindum, sinnaður at yvirtaka, hóast vit sjálvi skulu gjalda fyri tær um- og útbyggingar, sum standa fyri framman. Tjóðveldisflokkurin tykist, eftir tíðindum, sinnaður at fáa danskar myndugleikar at gjalda fyri tær ætlaðu ábøtur-nar.

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum, formaður Tjóðveldisfloksins, heldur einki løgið vera í hesum. Hann samanber smálið við, tá tú ella eg skulu keypa ein bil. Hann vísir á, at tú fert ikki at keypa ein bil, uttan at tú hevur fingið vissu fyri, at bilurin er í lagi. So vítt kunnu tey flestu vera samd við Høgna Hoydal. Men kortini skal spurnartekin setast við samanlíkningargrundarlagið. Tá tú ella eg skulu keypa ein bil, gjalda vit fyri hann, og kostnaðurin verður settur eftir tí metta virðinum, bilurin hevur.

Øðrvísi er við floghavnini í Vágum. Hana ætlar landsstýrið, ella ein partur í landsstýrinum, bara taka yvir uttan at gjalda nakað afturfyri. Floghavnin – við breyt, flúgvitólum og bygningum – skal ikki metast og yvirtøkuprísurin ásetast eftir hesum virði!

Flestu føroyingar eru samdir um, at trygdin í floghavnini skal vera í lagi, og at tólini, sum flogfør brúka, tá tey koma ella fara, skulu vera framkomin og í toppi. Somuleiðis munnu flestu føroyingar halda, at so leingi at floghavnarviðurskifti eru donsk málsøki, eiga danskir myndugleikar at rinda fyri ætlaðar útbyggingar og neyðugar ábøtur. Men at krevja, at danir skulu gjalda eini hálvtannað hundrað milliónir krónur fyri hesi arbeiði, samstundis sum landsstýrið boðar frá, at málsøkið skal yvirtakast, er ikki bara næsadjarvt, men bart út ómoralskt.

Tað er í samljóð við allan sjálvstýrispolitikk, sum allir flokkar uttan Sambandsflokkurin taka undir við, at taka yvir málsøki so við og við. Einki er meiri natúrligt, enn vit skjálvi eiga og skipa fyri teimum ymisku samfelagstættunum. Áður hava vit tikið yvir, men vit hava í fleiri førum bara goldið fyri fyrisitingina og ikki fyri rakstur. Tað var tá, men í verandi sjálvstýristilgongd er tann mannagongdin ónýtilig. Haraftrurat eru vit betur fyri búskaparliga enn í mong harrans ár. Tí er tað einki annað enn ómoralskt at lata nakran annan enn føroyska landskassan gjalda fyri ábøtur í Vága Floghavn!

**Sosialurin**

## VIÐMERKING

# Dømi: Læraraskúlin

**Súsanna Dam**



Gølan á Læraraskúlanum er eitt skúladømi uppá, hvussu væl vit duga at snúgva okkum undan at taka avleiðingar og ábyrgd av týdningarmiklum men ótespiligum málunum. Hóast málið heilt einfalt snýr seg um eina at vísa seg áralanga meirnýtslu á Læraraskúlanum, so hava bæði politikkarar, pressa og onnur áhugað fløkt tað upp í ellibita, sum nú snýr seg um dygdina av undirvísing og so serstakliga um dygdina av rektaranum á skúlanum. Vit undrast og minnast. Teir sum gjørdu fíggjarlógir í 80'unum høvdu onga løtu nakra ætlan um at yvirhalda lógina, og øll vistu, at soleiðis var. Tá grannskoðarar eini 6–7 ár seinni tá roknskapur fyrilá mótmæltu ovurnýstluni, gjørdu vit bara gjøldur burturúr og, so hendi einki meira, fyrrenn alt, sum tað var, brendi saman.

So skuldi annað skil fáast á. Politikkarar sum søgdu seg kenna sína ábyrgd saman við einum embætisveldi, sum eisini kendi sína ábyrgd, skuldu tryggja okkum, at vit ongantíð aftur koma í slíka støðu. Hvussu kann hetta so bera til. Og hví skal hendan gølan køvast. Kemst hetta av, at vit ongantíð ruddaðu upp heima hjá okkum sjálvum, men til fulnar megnaðu at geva dønum skuldina? Er ætlanin at vit framhaldandi skulu lata standa til og fjala okkum fyri veruleikans krøvum um vit og skil í dagligu tilveru okkara? Hvør er tilreiðar einaferð aftur at átaka sær tær fíggjarligu avleiðingarnar, sum politiskar skarnsgerðir føra omanyvir okkum?

# Skund at byggja nýggjan Smyril

**Nicodemus Nicodemussen**
*á Sandi*

Suðuroyggin hevur einki at skammast yvir, men vit skulu skammast, um nakað er at skammast.

Vit hava nógv góð minni um Tvøroyri, Vág og aðrar bygdir í Suðuroy, fyri ikki at gera nøkrum órætt. Vit her norðanfjørðs hava nógvar úthandlar, sum í dag verða gjørdir til bygdarsøvn, hugsið um tað! Byggið nýggjan Smyril nú, kanska kemur hann í sigling 2010, hann er so nógv størri enn Teistin.

# Norðurlendsk skúlabókasavnsráðstevna

**í Havn í døgunum 27. juni–2. juli 2001**

**Skúlabókasavnsfelagið**

Norðurlendska Skúlabókavarðafelagið skipar í samstarvi við Skúlabókasavnsfelag-ið fyri ráðstevnu í Havn í hesum døgum. Henda fimtanda ráðstevna, ið hevur yvirskriftina: »Felags norðurlendsk skúlabókasavnsmenning – er tað møguligt?« verður á Hotel Føroyum í Havn í ár. Hetta er aðru ferð at ein slík ráðstevna er í Føroyum. Fyrru ferð var í1986. Evnini á slíkum ráðstevnum eru ymisk, men felags fyri hesar ráðstevnum er, at tær snúgva seg um barnabókmentir, skúlabókasavn, undirvísingarmiðlar og undirvísing. Í ár hava vit so valt at leggja dent á sjálvt arbeiðsstaðið hjá skúlabókavørðinum, skúlabókasavnið – námsfrøðiliga tænastudeplin.

Ymisk er, hvussu skúlabókasøvnini eru skipað í teim ymsu londunum. Á hesari ráðstevnu fara vit at vita, um vit kunnu leggja eina felags strategi fyri, hvussu vit kunnu skipa skúlabókasavnið í komandi tíðum. Nýggja kt-tøknin gevur nýggjar møguleikar at fáa til vega upplýsingar og bera fram upplýsingar og vitan. Hetta gevur avbjóðingar til undirvísing og skúla, og í hesum er skúlabókasavnið ein týðandi partur.



Ráðstevnan er skipað sum fyrilestrar, innlegg, orðaskifti, bólkaarbeiði og framløgur.

Tað verða eisini stundir hjá teim 40 norðurlendsku gestunum at uppliva føroyska náttúru og mentan. Ráðstevnan byrjar hóskvøldið 27. juni við at rithøvundurin, Hanus Kamban, heldur fyrilestur, hann nevnir »Føroyar og Evropa – Hvussu føroyskt hevur fótað sær í mentanarliga samskiftinum við Norðurlond og Evropa«.

Norðurlenska Skúlabókavarðafelagið er at treffa á http://www.n-s-f.dk/

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKING

# Tann einfalda verð

**Kristian Magnussen**
*løgtingsmaður*



Tað, sum merkir politiska gerandisdagin í Føroyum í dag, er at Guð náði tann, ið dittar sær at meina, at verðin og føroyska samfelagið er meira fjøltáttað og samansett, enn tað, ið samgongan byggir sína politisku ætlan á. Vísir tú á faktiskar veruleikar, gerast teir frá sær sjálvum og royna at prógva við útvaldum tølum, at teir t.d. raðfesta vælferðina hjá føroyingum hægri enn nakar annar hevur gjørt áðrenn teir. Vísir tú á søguligar búskaparligar veruleikar, at búskapurin kann verða fyri hóttafalli, og at vit eiga at vera varin í okkara metingum um búskaparvøksturin, svara teir aftur við at leingja teirra búskaparligu vakstrarlinjur heilt upp til himmals.

Einfalda fatanin av verðini og samfelagnum sum heild, merkir eisini politikkin í tí ríkisrættaliga spurninginum. Strategi landsstýrisins er dupul, teir halda seg kunna diktera dønum at gera eftir teirra krøvum, meðan tað hinvegin ongantíð er betur, enn um tað samstundist eydnast teimum at provokera danir somikið, at teir koma til at siga okkurt, ið kann tulkast sum niðursetandi um føroyingar. Tá fáa teir veruliga útloysn og rópa í kóri, hygg, hvat søgdu vit, danir eru koloniharrar og imperialistar.

Nú nærkast valið og desperatiónin hjá serliga størsta samgonguflokkinum gerst alt sjónligari. Ikki eitt einasta málsøkið er fyrireikað til yvirtøku, og prísurin teir hava goldið fyri lovaða landi, er knæfallið fyri nýliberalismuni hjá Fólkaflokkinum. Formaðurin førir seg framhaldandi fram sum ein charlatan saman við falna landsstýrismanninum. Tá man bert hevur sjálvrósið eftir, tá ríður man lágt.

Tað at stýra fólki við kenslum er ein gomul og vælkend strategi, sum er gjøgnumskoðað og avúkað, hóast man enn í dag kann órógvast av at floksleiðarar í enn fáa vind í seglini við slíkum strategium.

Hóast floksformenn í samgonguni nú, aftaná at einstaklingar og fjølmiðlar hava víst á vánaligu korini hjá okkara óhjálpnu, nú siga seg vilja raðfesta mest átroðkandi tørvin hjá gerandisføroyingum, eiga fólk ikki at lata seg villeiða av hesum. Tann politikkurin, ið hevur verið førdur seinastu 3 árini prógvar, at samgongan ikki hevur evnini og viljan til at stýra einum landi, har fólk hava ymsar fatanir, virðir og ikki minst ymisk mál, eisini tá talan er um ríkisfelagsskapin.

Eg havið spurt um tað fyrr í blaðgrein og kann gera tað enn einaferð: Hvør eigur yvirskotið á fíggjarlógini? Eru tað tey foreldrini, ið ikki sleppa til arbeiðis, tí tey ikki fáa nøktandi ansing til børnini? Eru tað tey sálarsjúku, ið liva undir ómennisjaligum korum? Eru tað tey, ið JAVNI og MBF varða av? Eru tað røktarsjúklingar, ið ikki sleppa á røktarheim? Eru tað røktarheimini, ið mugu koyra fólk í song út á seinnapartin, tí játtanin ikki røkkur?. Er tað heimarøktin, ið ikki kann veita fólki tryggleika, hvørki á degi ella nátt? Er tað útjaðarin ella útoygjjar? Eru tað tey, ið ikki hava tak yvir høvdi? Er tað fólkaskúlin , ið ikki hevur fíggjarliga orku til fremja tað, ið er álagt honum? Er tað Læraskúlin, ið er vorin politisk kastibløka? Er tað Landssjúkrahúsið, ið má stongja deildir vegna sparingar og sum ikki fær neyðugu játtaninar tilnýbyggingina, umvælingarnar og viðlíkahaldið?

Bluffnummarið hjá samgonguni, at vit skulu umsita alt samfelagið og at tað skal ganga skjótt, kann ikki takast í álvara, tá man sær ráðaloysi innan Postverkið. Nú eru 26 ár liðin síðan hesin stovnur varð yvirtikin og enn í dag vita teir, ið hava reypa mest av hesi yvirtøku ikki, hvat teir skula brúka hann til. Samgongan hevur nú í 3 ár staðið sum ryssa yvir deyðum fyli, meðan stovnurin fer í hundarnar.

Nú 3 ár eftir proklameraðan fullveldispolitikk, hvussu væl hevur so samgongan lagað føroyska búskapin til eina tilveru uttan ríkisveiting. Í veruleikanum er ongin tillaðing gjørd, tvørturímóti. Rakstrarútreiðslurnar eru vaksnar nógv hóast ongir veruligir batar eru gjørdir á okkara vælferðarskipanir.

Tað tykist ikki sum um samgonguleiðarar skilja, at nakar kann verða ónøgdur, nú rakstrarútreiðslurnar eru vaksnar so nógv seinastu 3 árini. Teir skilja ikki at tað kostar at reka eina samfelagsskipan har øll skulu hava ein møguleika, uttan mun til fíggjarligu umstøðurnar og førleika.

Vit kunnu t.d.ikki krevja av teimun í arbeiðsførum aldri, at tey skulu skapa meirvirði á arbeiðsmarknaðinum, uttan at tey kunnu føla seg trygg við, at teirra børn og teirra gomlu, um tey hava tørv á tí, eru í tryggum hondum. Hóast samgongan heldur seg nýta nógvar pengar til vælferðarskipanir og tænastur, so er veruleikin tann, at londini rundan um okkum, undantikið Ísland, nýta forholdsvís nógv fleiri pengar til vælferðartænastur. Hesi lond hava enntá ætlanir um at nýta enn fleiri pengar fyri at økja um trivnaðin hjá borgarunum.

Tann seinasta desperata royndin hjá serliga tí eina samgongufloKkururin, ið til síðsta val ikki tordi at taka ta alternativu fíggjarlógina við ongum blokki úr skuffuni, borðreiðir nú við einum væntandi yvirskoti á fíggjarlógini í ár uppá umleið 600 mió. og nýtir hesa upphædd sum prógv fyri teirra búskaparliga skili. Aðrar útrokningar vísa, at úrslitið áðrenn avdráttir verður eitt avlop uppá 475 mió. og aftaná at avdráttir er goldin 339 mió. Hava vit so í huganum, at fíggjarlógin í ár hevur meira enn 100 mió. minni í útreiðslum av rentum og avdráttum enn t.d fíggjarlógin í 1997 og at blokkurin er yvir 100 mió. størri í ár, so er yvirskotið ikki størri enn í 1997, um blokkurin og útreiðslurnar av rentum og avdrátti vóru tær somu sum í 1997. Við øðrum orðum so hevur samgongan megnað at brukt allan inntøkuvøksturin hjá landskassanum, til øktar rakstrarútreiðslur. Landskassans inntøkur verða uml. 700 mió. størri í ár enn í 1997. So í veruleikanum er samgongan dumpað í búskapi, um endamálið er at brúka minni enn inntøkuvøksturin.

Tað avlopið sum nú verður sett meira inn í landsbankan enn t.d.í 1997, er tað vit sleppa bíligari í rentum og avdrátti og fáa í størri blokki. Fyrimunin av lægri rentuútreiðslum fáa vit ikki aftur og gongst sum henda samgongan ætlar, so er blokkurin skjótt søga og ein búskapargrunnur við fantasiliónum tað, ið skal avloysa blokkin.

Tað tragikomiska við støðuni er, at tað sum størsti samgongufloKkurin reypar sær av á búskaparliga økinum er alt orsaka av fíggjarligum fyrimunum, ið teir ongan heiður eiga av. Tjóðveldisflokkurin saman við Fólkaflokkinum atkvøddi ímóti at gera bankakanningina, ið fekk skelettini hjá Den Danske Bank at rapa úr skápinum. Vit sum atkvøddu fyri kanningini í Løgtinginum blivu eisini tá skýrdir at verða landasvíkjarar. Henda samgonga fór í 1998 til Danmarkar at samráðast um bankamálið, ið varð serverað teimum á einum silvurfati av undanfarnu samgongu, ið hevði sett allar hugsandi sefrøðingar at leggja eina strategi viðv. krøvunum móti Den Danske Bank og donsku stjórnini. Bankakanningin og strategiin, ið løgd var av undanfarnu samgongu, viðførdi at vit sluppu undan eini skuld uppá 900 mió. umframt at 500 mió. blivur niðurfrystar og skulu bert rindast aftur um olja verður funnin og um ikki, so verða tær avskrivaðar tá 20 ár eru ligin. Harumframt fingu føroyingar eina góða avtalu um afturgjalding av uttanlandsskuldini, ið danir átóku sær, tá vit høvdu stýrt okkum út á sjógv.

At henda samgongan eisini megnaði at koma heim aftur við einum blokkstuðli, sum í dag er vaksin meira enn 100 mió síðan hon tók við, vísir bert hvussu ússalig hon er, nú hon hevur biðið um at fáa blokkin minkaðan við 356 mió., tó ikki fyrr enn tá aðrir taka yvir aftaná næsta løgtingsval.

Hvør torir at loysa við slíkum charlatannum?



# Havnarkórið konsert í Listaskálanum

Í tí nógva tónleikameldrinum, sum er um hesa tíð, bjóðar nú eisini Havnarkórið, sum í ár fyllir hálvrunt – 35 ár – til kórkonsert í Listaskálanum sunnudagin 1. juli. Skráin, sum er prentað niðanfyri, fevnir um føroyskar sálmar og sangir, kórsatsir eftir Vagn Holmboe til úrvaldar yrkingar hjá William Heinesen, Christian Matras og J. H. O. Djurhuus, kendar norðurlendskar kórsangir og altjóða kórperlur bæði handan og hesumegin Atlantshav.

Konsertin byrjar kl. 17.00, og atgongupeningurin er 40 kr.

**Havnarkórið 35 ár**

Leiðari : Ólavur Hátún
Konsert Listaskálanum 1. juli 2001 kl.17.00

Gl. før. sálmalag, Nú rennur sólin fríð, Th. Kingo/ Christian Matras, (Kórsatsur: Kári Bæk, f. 1950)
Gl. før. sálmalag, Hin ljósi dagur farin er, Hans Chr. Sthen/Jákup Dahl, (Kórsatsur: Karl Clausen, 1904–72)
Alexandur Enniberg, 1879–1949, Hvørjum man tykja vakurt hjá sær, Fríðrikur Petersen
Hans J. Højgaard, 1904–1992, Einki er sum summarkvøld við strendur, Christian Matras
Knút Olsen, f. 1945, Føroyar, mín móðir, Pól F. Joensen
Vagn Holmboe, 1909–1997, Gras, W. Heinesen/T. N. Djurhuus
Vagn Holmboe, Krabbaskelin, Chr. Matras
Vagn Holmboe, Heyst, J. H. O. Djurhuus
Niels W. Gade, 1817–90, Morgensang af »Elverskud«, B. S. Ingemann
Oskar Lindberg, 1887–1955, Pingst, Oscar Levertin
Fríðrik Bjarnason, 1880–1962, Abbalabbalá, Davið Stefánsson frá Fagraskógi
Finskt fólkalag (arr. Ahti Sonninen), Kesäilta - solo: Arina Bischoff
Edvard Grieg, 1843–1907, Våren - solo: Sanna í Brekkunum, A. O. Vinje
John Bennet, 1570–1610, All creatures now are merry minded
Negro spiritual (arr. H.T.Burleigh), Deep river
Negro spiritual (arr. W.L.Dawson), Ain´-a that good news
Kvæðalag (arr. Vagn Holmboe), Úr »Sigmundskvæði yngra«